# Jón var noyddur at taka av



Mynd: Álvur Haraldsen

**HONDBÓLTUR** Jón Ludvík hevur staðið seg væl sum linjuspælari hjá Neistanum í hesum kappingarárinum

Uni Holm Johannesen

Hann breyt beinið á ólavsøku í fjør og sat uttan fyri í eitt ár.

Roydni Jugoslav Djumic og ungi Kristian Dulavík hava verið skaddir higartil í hesum kappingarárinum, og tí hevur Jón Ludvík fingið møguleikan.

– Eg havi staðið í skugganum av Jugoslav Djumic, og tá eg byrjaði at venja í summar, hugsaði eg fremst av øllum, um beinið fór at halda. Tað gjørdi tað. Eg hevði ikki væntað at fingið so nógva tíð á vøllinum beinanvegin, men tá bæði Kristian Dulavík og Jugoslav Djumic vóru skaddir, kundi venjarin bara velja meg, sigur Jón Ludvík við heimasíðuna hjá Neistanum og ásannar, at støðan fer at broytast, nú Kristian Dulavík og Jugoslav Djumic eru við í hópinum til heimadystin móti Team Klaksvík.

Dysturin verður sunnudagin klokkan 16.00 í høllini á Hálsi.

# Aristide skiftir til 07 Vestur

**FÓTBÓLTUR** 07 Vestur hevur knýtt Tehe Aristide at hópinum. Tað skrivar heimasíðan hjá uppflytarunum

Uni Holm Johannesen

23 ára gamli verjuleikarin, ættaður av Fílabeinsstrondini, skifti til AB undan kappingarbyrjan í 2009. Hann hevur roynst argjamonnum væl seinastu tvey árini. Nú fara hann og vágamenn undir royndina at varðveita sætið í Vodafonedeildini.

Tehe Aristide er 190 cm langur og vigar 82 kilo. Umframt AB, hevur hann spælt við barndómsfelagnum Siquilolo.



Mynd: www.07vestur.fo



*Frá vinstru: Jón Bjarnason, Magnus Jákupson, Pál Joensen, Birita Debes, Turið Kjørbro og Rókur í Jákupsstovu*

Mynd: Jens Kristian Vang

# Pál og Jón heiðraðir

**SVIMJING** Mánakvøldið vendu Pál Joensen og venjari hansara, Jón Bjarnason, heim til Vágs, eftir luttøku í World-Cup í Svøríki, og har varð skipað fyri móttøku

Uni Holm Johannesen

Vágbingar vístu enn einaferð hetjuni úr Vági heiður. Pál fekk móttøku við fýrverki og fagnaði. Skipað var fyri, at til bar at heilsa uppá Pál og Jón í Billardhúsinum í Vági. Umframt røður, fingu teir gávu og blómur frá Vágs Býráð.

Á móttøuni í Havn fyrr um dagin, segði Jon Hestoy, at slíkar løtur var tað heimsins lættasta arbeiðið at vera formaður í Svimjisambandinum.

– Vit hava svimjarar, sum levera úrslit, ið ongin nakrantíð í lívinum hevði droymt um, at nakað ítróttarfólk kundi gera, segði formaðurin í Svimjisambandinum.

– Eg eri vísur í, at við, at við hjálp frá góðum stuðlum og landinum, er hetta ikki endin av tí, sum svimjararnir kunnu røkka, men bara byrjanin.

Fremsta úrslitið hevði, ikki óvæntað, Pál Joensen, sum vann tvær gull, tríggjar silvur og eina bronsu.

– Eg tori at siga, at hetta er besta úrslit, nakar ítróttarfólk nakrantíð hevur vunnið í eini altjóða kapping, segði Jon Hestoy.



*Seks heiðursmerki í sjey dagar er ikki at forsmáa*

Mynd: Jens Kristian Vang

– Hann er ein viti í føroyskum ítrótti, legði Edvard Heen, stjóri í Tryggingini afturat, sum annars fegnaðist um hetta fantastiska bragdið hjá føroysku svimjarunum. Hann hevði enntá hug at samanbera Pál við legendariskar svimjarar sum Mark Spitz og Michael Phelps.

Hann helt, at leikluturin, sum familjan hevur fyri slík úrslit, má ikki undirmetast.

– Kanningar vísa, at nógv flestu ítróttarfólk, sum koma í fremstu røð, hava eina familju, sum stuðlar treytaleyst og tað krevst fyri at koma heilt á tindarnar.

Á myndini eru frá vinstru, Jón Bjarnason, venjari, Magnus Jákupson, Pál Joensen og Birita Debes, svimjarar, Turið Kjørbo, fysioterapeutur og Rókur í Jákupsstovu, ferðaleiðari.

uni@sosialurin.fo